# Eru Føroyar fyri støk við børnum?

ANNIKA OLSEN
Býráðslimur í Tórshavnar kommunu



Hesin spurningur er áhugaverdur at seta eftir stóru kanningina av, hvussu nógvir føroyingar eru búsitandi í Danmark. Kanningin vísti, at heili 21.687 føroyingar búgva í Danmark, og svarar hetta til 3. hvønn føroying. Umframt høgu tølini av útbúnum læknum, løgfrøðingum, sum búðu í Danmark, so vísti kanningin eisini, at yvirhøvur vóru tað føroyskar kvinnur, ið eru búsitandi í Danmark, har serliga aldursbólkurin 25-39 var best umboðaður.

Tað, sum eg haldi vera enn meiri áhugavert er vita hvussu nógvar kvinnur av hesum 21.698 eru støkar við børnum. Fer eftir fer hoyrir man um um stakar mammur, ið ikki síggja seg førar fyri at flyta heim aftur til Føroyar vegna fíggjarligar trupulleikar. Leiguprísirnir eru ov høgir, kostnaðarstøðið er ov høgt, barnafrádrátturin ov lítil, ongin "íbúðarstuðul" o.s.fr.

Hyggja vit eftir kostnaðarstøðinum, so kostar ein pakki av blæðum 150 kr í Føroyum, meðan hann kostar 90 kr. í Danmark, ein pakki av mjólk kostar áleið 5 kr í Danmark móti 10 krónum í Føroyum. Taka vit barnastuðulin so er hann umleið 3300 kr kvartalið pr barn í Darnmark (13.200 um árið pr barn) meðan vit hava ein barnafrádrátt uppá 5500 um árið pr barn. Íbúðarstuðulin í Danmark verður roknaður eftir inntøku, so er talan um eina lága inntøku, so verður leigan munandi minni, meðan vit ongan íbúðarstuðul hava í Føroyum. Um mánaðin verður hetta til nógvar pengar hjá einum støkum við barni, og tá vigast skal á vektskálini, hvar man verður búsitandi, so velur man sjálvandi oftast av neyð at verða verandi í Danmark. Tey støku við børnum, sum stríðast fyri at vera verandi í Føroyum verða ofta noydd at geva børnum sínum saft heldur enn mjólk – so Føroyar kann ikki eitast at vera eitt vælferðarsamfelag fyri øll. Hetta er skomm fyri Føroya land, og ein diskriminering av grovasta slag av støkum. Føroyar hava ikki ráð til støk við børnum, tað kunnu vit lata danir um – so groft kann tað tykjast fyri manga mammu og mangan pápa, ið føla so noydd at búgva i Danmark, meðan hjarta liggur í Føroyum!

Her skal leggjast avtrat, at tað eru aloftast somu orsøkir, sum gera, at barnafamiljur, ið sita hart í tí fíggjarliga, kenna seg noydda at búseta seg í Danmark.

Vit eiga í nógv størri mun enn áður at gera lívið laga hjá støkum við børnum og barnafamiljum yvirhøvur og skapa góðar karmar her í Føroyum, so at vit fáa so nógv av hesum kvinnum og monnum heim og forða fyri at enn fleiri flyta av landinum. Vit hava ikki ráð til at missa hesir føroyingar, ið størri og størri mun immigrera til Danmarkar. Føroyar skulu vera fyri øll, eisini støk við børnum.

# Tað er tungt at standa á einum beini

HELGI ABRAHAMSEN



**Skal blokkstuðulin fastfrystast ella skal hann prístalsregulerast? Tað er ein av teimum stóru politisku spurningunum í løtuni**

Poul Michelsen segði í eini blaðgrein týskvøldið, at besta búskaparliga avgerðin sum tikin er í nýggjari tíð, var tá løgtingið samtykti at skera blokkstuðulin við 366 mió. krónum árliga. Og fyri líkasum at gera hetta "bragdið" uppaftur betri, setti hann ynski fram um, at minst 100 mió. krónur verða tiknar av blokkinum afturat.

Sigast má, at um blokkniðurskururin er besta búskaparliga avgerðin í nýggjari tíð, so lystir meg at vita, hvør tann ringasta avgerðin í nýggjari tíð man vera. – Hon kann neyvan vera nógv at rópa hurrá fyri !

### Hvat var tað sum hendi í 2002?

Fyrstu árini eftir búskaparkreppuna í 90-unum vóru merkt av stórum búskaparvøkstri. Hetta hevði við sær, at landskassin í 2001 hevði eitt avlop, sum var næstan 700 mió. krónur, og beinanvegin lótu loysingarflokkarnir seg freista til at gera yvirtøkur og harvið at lække blokkin. Frá 1. januar 2002 blivu 366 mió. krónur tiknar av blokkstuðlinum, men hetta hevði samstundis ta vanlukkuligu fylgjuna við sær, at longu sama ár kom avlopið hjá landskassanum niður um 200 mió. krónur. Avlopið minkaði sostatt eina hálva milliard krónur eftir bert einum ári. Síðani kom eitt lítið fall í búskapinum tey fylgjandi árini, og yvirskotið vendist til undirskot. Hetta er tað sum Poul Mikkelsen kallar "besta búskaparliga avgerðin sum tikin er í nýggjari tíð".

### Ikki rætti mátin

Sum eg havi ført fram onkuntíð fyrr, so er einki galið í tí, at fólk hava ein dreym um, at okkara sjálvskaptu inntøkur verða minst líka stórar sum útreiðslurnar. Men at billa sær inn, at vit fáa sjálvberandi búskap einans við at senda eitt bræv til donsku stjórnina, har vit biðja um at fáa færri pengar, og at so kemur restin av sær sjálvum, tað er ein álvarsom misskiljing. Skal landskassin klára sínar skyldur uttan blokkstuðul, so mugu vit finna nýggjar inntøkur at seta ístaðin fyri tað, sum vit missa, og tær inntøkurnar koma ikki dettandi niður úr luftini.

Alt tað eg kann minnast, hevur verið tosað um, at vit mugu finna "eitt nýtt bein at standa á". Einaferð skuldu farmaskip gerast tað nýggja beinið, eina aðru ferð var tað svartkjaftur. Á flakavirkjum varð tosað um at gera lidnar vørur, og í politisku skipanini var gandaorðið "gransking". So var tað aling og síðani ferðavinna, og ikki at gloyma igulkerini. Tað næsta verður helst olja. Men framvegis liva vit í Føroyum í høvuðsheitum av hálvvirkaðum fiskavøran og donskum blokki. Ja tað er enntá so galið, at tað sum fyrr var útflutt hálvvirkað, verður nú í stóran mun útflutt sum rundur fiskur (óvirkað), og framvegis vilja nógvir politikarar ikki tosa um at finna eina betri marknaðaratgongd fyri okkara fiskavørðum.

### Tað kostar at liva

Tað kostar at liva, og tí mugu vit hava nakrar inntøkur til samfelagið. Landskassin hevur bara tvær høvuðsinntøkukeldur og skal onnur burtur, so má hin vaksa, og tað vísir seg at ganga illa.

Og her er tað at eg má spyrja: Hvørjar nýggjar inntøkur fann fullveldislandsstýrið í 2002, at seta ístaðin fyri tær 366 milliónirnar sum hvurvu? Hvørjar almennar sparingar blivu gjørdar hetta árið? Hvørjir pengar eru fingnir til vega í sambandi við at blokkurin varð fastfrystur? Og hvørjar inntøkur ella sparingar hevur Poul Michelsen klárar at seta í verk í sambandi við at hann ætlar at skerja minst 100 mió. krónur afturat av blokkinum?

Tað hevði verið gott um Poul Michelsen hevði kunna svara hesum spurningunum konkret.

## Føroya Tele 28 mió kr í yvirskotið fyrra hálvár

**Talan hevur veirð um eit tað besta hálvárið hjá Føroya Tele samtakinum. Nettosølan øktist við 4% úr 151,9 mió kr til 158,5 mió kr fyrra hálvár í ár.**

BÚSKAPUR

Nevndarfundur hevur verið í Føroya Tele samtakinum, har hálvársroknskapurin fyri 2006 varð lagdur fram.

Talan hevur verið um eitt tað besta hálvárið hjá samtakinum, og øktist nettosølan við 4% úr 151,9 mió. kr. fyrra hálvár í fjør til 158,5 mió. kr. fyrra hálvár í ár. Vøksturin í nettosøluni, stavar serliga frá øktari sølu av breiðband, GSM, og Televarpið.

Úrslitið fyri fyrra hálvár gjørdist 28,0 mió. kr., eftir at 6,1 mió. kr. eru settar av til skatt. Hetta er góðar 6 mió. kr. hægri enn fyrra hálvár í fjør, tá úrslitið var 21,9 mió. kr.

Felagið væntar, at úrslitið fyri 2. hálvár verður á nøkunlunda sama støði, og at samlaða úrslitið fyri 2006 fer at liggja um 50 mió.kr. eftir skatt.

## Berin: Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung

Nú byrja vit aftur við nýggjum sjálvhjálparbólkum fyri børn og ung, sum hava mist foreldur ella syskin við deyða. Aldurin fyri luttøku er frá 8 ár og uppeftir.

Higartil hava millum 60 og 70 børn og ung verið við í sjálvhjálparbólkum.

Bólkarnir eru ætlaðir sum ein hjálp, til at fáa ein liviligan gerandisdag. Í bólkinum verður ikki veitt akutt kreppuhjálp. Tí skal nakað vera fráligið, síðani avvarðandi doyði.

Hinvegin sær tað ikki út til, at tíðin kann blíva ov long. Børn og ung, sum hava mist foreldur ella syskin fyri fleiri árum síðani, hava eisini havt gleði av bólkunum.

Tíðin gongur skjótt, og arbeiðið við sjálvhjálparbólkum er drúgt. Tey, sum vilja verða við frá byrjan, vera tí biðin um at siga frá sum skjótast. Tað kann gerast hjá Jóngerð Poulsen á tlf. 316419/227074 ella T-postur jongerd. poulsen@skulin.fo

## Aftankvirra í Havnar kirkju í kvøld

**Fyrsta fríggjakvøld í mánaðinum kl 21 er aftankvirra í Havnar Kirkju. Í kvøld kl 22 er sangur á skránni, har Petra Iversen syngur**

AFTANKVIRRA

Í juli fór Havnar kirkja undir nýtt tiltak.

Kirkjan er opin fyrsta fríggjakvøld í hvørjum mánaði kl. 2 – 23, har møguleiki er hjá fólki at koma og sita í kvirru.

Ikki er púra kvirt alt kvøldið.

Klokkan 22.00 er tónleikur ella sangur á skránni, og kl. 22.30 er stutt andakt.

Í kvøld, fríggjakvøld 1. september er aftur aftankvirra í Havnar kirkju, har Petra Iversen syngur kl. 22.00.

# Aftursvar til Bill Justinussen løgtingsmann

Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum vil við hesum harðliga átala, at ein løgtingsmaður loyvir sær alment at seta fram so harðan kritikk av læknabólkinum undir einum. Tað er neyvan so, at allir læknar á Landssjúkrahúsinum eru líkasælir og ódugnaligir kynikarir við samstarvstrupulleikum.

Sum løgtingsmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í heilsumálum eigur Bill Justinussen um nakar at vita, at á øllum stórum landsstovnum, har fólk starvast, kunnu feilir vera gjørdir, og hesir skulu sjálvandi staðfestast, so møguleiki er at fyribyrgja endurtøku. Tí hava vit eina kæruskipan. Okkum vitandi eru ikki fleiri sjúklingakærur mótvegis Landssjúkrahúsinum enn aðrastaðni í norðanlondum.

Torføra uppgávan hjá læknunum og leiðslunum á Landssjúkrahúsinum hevur verið ár undan ári at finna nýggjar sparingar, tí fastar útreiðslur til medisin, nýtsluvørur, hita o.s.fr. eru vaksnar, uttan at játtanin er økt samsvarandi.

Tí hevur millum annað verið neyðugt at minka um talið av røktarstarvsfólki og seingjarplássum fyri at fáa endarnar at røkka saman, og hevur tí eisini verið neyðugt at útskriva fólk alt fyrr enn áður og seta strangari krøv til, hvussu sjúkur ein skal vera fyri at verða innlagdur, tí ambulant viðgerð er bíligari, har hon letur seg gera.

Til samanberingar hava myndugleikarnir í Danmark sambært tølum frá amtsrådsforeningen seinastu árini økt játtanina til heilsuverkið við í meðal 1 milliard krónum hvørt ár, vitandi at alt fleiri gerast sjúk, tí fleiri gerast eldri, alt fleiri sjúkur kunnu staðfestast við nýggjum og dýrum kanningarhættum, og at alt fleiri sjúkur kunnu viðgerast við nýggjum stak dýrum heilivági. Vantandi játtan saman við stórum trupulleikum at útvega serlæknar ger, at vit á Landssjúkrahúsinum hava ringt við at halda støðinum eins høgt og í hinum norðanlondunum. Tí er tað bótin, ið einki bøtir, at fólkavaldir politikarar skjóta alla ábyrgdina á læknabólkin, sum ikki hevur loyvi at seta fram almennan kritikk av viðurskiftunum, men bert má royna at fáa tingini at koyra sum frægast innan ótakksomu karmarnar, sum júst Bill og hansara starvsfelagar seta.

**Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum**
**Høgni Djurhuus, formaður**
**Petur Ellefsen**
**Fróði Joensen**
**Torbjørn Viderø**
**Jens Andreassen**